# Klár til jóla hjá Heimdesign




*Heimdesgin í Dr. Jacobsensgøtu varð sett á stovn í 2006 av Jóa Winther og familjuni, og verður rikin sum familjufyritøka*

**Heimdesign í Dr. Jacobsensgøtu í Havn hevur tað mesta, ið tørvur er á í húsarhaldinum, tá umrøður stell, kaffimaskinur, ketlar ella dustsúgvarar. Hjá Heimdesign eru tey klár til jóla, og nógv nýggj vøra er heimkomin**

Heimdesgin í Dr. Jacobsensgøtu varð sett á stovn í 2006 av Jóa Winther og familjuni, og verður rikin sum familjufyritøka.

Fyritøkan selur stell, kaffimaskinur, ketlar og annað.

Um somu tíð, sum fyritøkan byrjaði, góvust Dulamenn, og Heimdesign keypti vørugoymsluna. Hervið førdu tey víðari søluna av dustsúgvarum, dustsúgvaraútgerð og dustsúgvaraposum, sum Dulamenn í mong ar hava selt.

Alt hetta fæst nú hjá Heimdesign.

## Familjufyritøka

Heimdesign verður rikin sum familjufyritøka. Hjálp verður heintað frá børnunum hjá Joa og frá foreldrum hansara, Sommer og Bjørga, sum ikki eru bangin fyri at geva eina hjálpandi hond, hóast tey eru farin um tey sjeyti árini.

## Framgongd

Síðani byrjan, hevu støðug framgongd verið, men nú merkist afturgongd, ella talan er um stilli, heldur Jói.

- Tey, ið siga annað, fara lætt um sannleikan, heldur Jói, ið tó ikki leltur illa at, hóast tað dregur á luftina búskaparliga kring allan heim.

Hjá Heimdesign eru teyu klár til jóla, og nógv nýggj vøra er heimkomin, so møguleikin fyri at finna røttu jólagávuna er stórur hjá Heimdesign.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*










